# d við
# sangum



*Trond Erics vóru júst tað, ið fólk væntaðu og ynsktu, at teir vóru*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

væl. Hann hevur eina djúpa smørrødd, sum heldur ikki hevði trupulleikar at raka høgu tónarnar. Og hann sá eisini gott út. Sum onkrar gentur søgdu – "hann er lekkur!" Hann veit akkurát, hvussu man leiðir eina tílíka konsert. Hann var sjarmerandi og hevði gott samband við áhoyrarnar.

## Lisa gestasangari

Lisa Fredriksberg var gestasangari á konsertini. Saman sungu tey tveir sangir; sangurin "Spejlbilde" var í góðum gomlum Melodi Grand Prix-stíli. Lisa varð klappað uppaftur til at verða við í einum eykalagi. Bassspælarin skift bassin út við saksofon og gittarspælarin fekk sær eina harmoniku, og teir endaðu showið við einum mergjaðum slagara á enskum.

Hóast tað var uttan Trond Erik, so var tað framvegis nokkso grundt. Men tað var einfalt og beinleiðis, og sangirnir vóru kendir; so fólkið fekk tað, sum tey væntaðu og vildu hava.

# Direct Level í mentari útgávu

**Eini 300 fólk vóru komin saman við innipallin í Kelduni at hoyra Direct Level av Strondum. Teir spældu eina spennandi og væl tilrættarlagda rokkkonsert**



*Sangarin Dan Leivsson er største styrkin hjá Direct Level*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

UMMÆLI
*Oddur á Lakjuni*
*Planet@sosialurin.fo*

Hetta var fyrsta konsertin hjá Direct Level í eitt heilt ár. Tað hoyrdist tó einki ti,l at teir vóru rustaðir – teir eru væl samanspældir, sangirnir eru góðir og sita væl.

Direct Level spældi nokkso seigan og til tíðir harðan rokk, sum ofta byrjaði friðarliga og bygdi upp til eina sterkari ljóðmynd. Tað hoyrdist, at teir hava lagt stóran dent á, hvussu sangirnir eru lagdir til rættis, og hvussu teir verða bygdir upp.

## Evnaríkur Dan

Stóra styrkin í bólkinum er heilt avgjørt sangarin og gittarspælarin Dan Leivsson. Hann syngur ótrúliga væl, klárar væl at fara í falsett og rakar tónarnar beint á. Hann hevur ment seg nógv síðani seinastu konsertina fyri ári síðani, og tað er sum um, at hann nú torir betri at geva seg fult út. Bæði tey, sum ikki høvdu hoyrt teir fyrr, og tey, sum kendu bólkin, vórðu bilsin av, hvussu væl hann megnaði leiklutin sum sangari og oddamaður.

## Stuttligir fjepparar

Í seinasta sanginum "The Levels" bjóðaði Dan nøkrum fjepparunum upp á pallin at syngja við. Upp fóru nakrir ungir mans, allir í bundnari troyggju. Teir sungu við í niðurlagnum, og hóast teir bara skuldu syngja "dadada...", so høvdu teir blað við teksti á, og sungu burturúr tí.

Í hesum sanginum minti tónleikurin rættiliga nógv um The Killers. Feitur rokkur, og Dan slepti sær sjálvum leysum.

Direct Level hava ment seg nógv hetta seinasta árið, og serliga hevur Dan tikið seg nógv fram sum sangari. Tað er góðska í sangøunum, og tað kann blíva heilt spennandi, um teir halda á við at betrast.

# Lovsongur við Reach 'm Loud

**Lovsongsbólkurin í Kelduni hevði eina songløtu leygarkvøldið. Tað var lovsongur sum man plagar at hoyra á ungdómsmøtum**

UMMÆLI
*Oddur á Lakjuni*
*planet@sosialurin.fo*

Lovsongsbólkurin í Kelduni hevur fingið sær navnið Reach 'm Loud. Leygarkvøldið fóru tey á pallin í bestu festivaltíð. Sjálvur tónleikabólkurin er seks ungir mans, og teir spældu okkurt, sum líktist emo-punki, meðan tær seks sangarinnurnar komu inn á pallin.

Ein av sangarinnunum gjørdi beinanvegin greitt, at hetta var ikki ein konsert. Hetta var ein ein lovsongsløta, har øll saman skuldu lovprísa Gudi.

Og lovsongsløta var júst tað, sum áhoyrarnir fingu. Sangirnir vóru ofta langir og nógv upp í saman, og um man ikki er til tílíkan lovsong, so var kanska ikki lætt at fáa so nógv burturúr hesum. Men ungu áhoyrararnir í salinum vóru í hvussu er við uppá tað. Tey kendu sangirnar og sungu við. Sangirnir vóru typiskir samkomulovsangir, tó kanska villari enn tað plagar. Bólkurin hevði orku, men spældi ikki heilt tight allatíðina.

## Ljóðið batnaði

Mannligi sangarin hoyrdist væl, men fyrstu sangirnar hoyrdust kvinnurnar illa. Tað var ikki fyrr enn tey sungu "More Love, More Power", at ljóðið varð gott. Hesin sangurin var tungur, í stíl við Evanescence, og tað riggaði væl. Hetta var besti sangurin á konsertini; nei, orsaka, á lovsongsløtuni.

Tekstirnir vóru konseptinum trúgvir – einfaldir og lovprísaðu Gudi.

Tað var sum á einum møti. Flestu áhoyrararnir vóru nokk vanir við hendan tónleikin frá ungsómsmøtum, og tey fingu júst eina tílíka lovsongsløtu.



*Reach 'm Loud sungu kendar sangir saman við áhoyrunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*